## Aftur skjóting í Keypmannahavn

Triðja samdøgrið á rað var aftur ein skottilburður í Keypmannahavn í nátt. Hesaferð var tað uttan fyri eina kaffistovu á Amager. Fýra fólk vórðu rakt av skotum. Tey vórðu flutt á sjúkrahús alt fyri eitt, men eitt teirra doyði stutt eftir. Eygnavitni hava greitt løgregluni frá, at ein maður bleiv noyddur at leggja seg niður á vegin. Síðani bleiv hann skotin, men slapp við lívinum. Síðani fóru teir báðir gerningsmenninir inn í kaffistovuna, har teir skutu frá hond. Trý fólk vórðu rakt, og eitt teirra doyði. Enn hevur løgreglan einki sagt um álopsmenninar, ella um tilburðurin kann hava nakað samband við uppgerðina millum ymisk harkalið, sum hava herjað Keypmannahavn í seinastuni. Í gjárkvøldið bleiv ein 38 ára gamal maður stungin á einari matstovu á Nørrebro. Hann er ikki í lívsvanda, sigur løgrerglan.






*Winnie Simonsen verður leiðari á Etika, sum millum annað fer at selja vín úr einari sjálvtøku, har kundin kann smakka seg fram millum fleiri spennandi sløg av víni úr stóra vínkjallaranum á Hotel Føroyum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vín og sushi á Áarvegnum

etika
gott, sunt, skjótt

**Gott, sunt og skjótt er endamálið við Etika, sum er letur upp 1. mai í hølunum, har Jinx var fyrr**

BÝARLÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Meðan onnur snara lyklinum skeiva vegin, snarar Hotel Føroya-samtakið lyklinum rætta vegin.

1. mai letur eitt øðrvísi mat- og vínstað upp, sum hevur fingið navnið Etika. Ætlanin er at bjóða lættan og sunnan mat og gott vín afturvið. Eitt nú sushi og lættir sandwish's, sum eisini kunnu keypast við út, og vín, smoothies, djús, kaffi og coffie to go.

Tað serliga við víninum í Etika er, at tað kemur úr stóra, nýggja vínkjallaranum á Hotel Føroyum, og at tað er slíkt, sum ikki fæst til keyps í Rúsuni enn. Har vera millum 16 og 24 ymisk sløg, sum so verða skift út hvønn mánað.

### Vín úr sjálvtøku

Vínið verður at fáa úr einari sjálvtøku, ella einari vínmaskinu, har kundin keypir sær eitt kort við kassan áljóðandi eina ávísa upphædd. Eftir hetta ber til at keypa sær vín úr maskinuni, við at draga kortið ógjøgnum eina slisku.

- Við hesum vóna vit, at tað verður eitt sindur meira spennandi at drekka vín í Føroyum. Tí tað ber eisini til at keypa sær ein lítlan smakk, og soleiðis at royna seg fram. So fyri einar 100-150 krónur ber til at fáa eitt gott vínupplivilsi, sigur 28 ára gamla Winnie Simonsen, sum verður leiðari á Etika. Hon er bachelor í føðslu og heilsu við sergrein innan catering.




*Modellmynd*

### Japanskur fiskur til føroyingar

Sushi, sum hevur verið sera vælumtókt í grannalondunum seinastu árini, er japanskur fiskarættur við ráum fiski, serligum rísi, tara og grønmeti. Fólkini handan Etika ivast ikki í, at sushi fer at fella í góða jørð í Føroyum, tí føroyingar ferðast nógv, og hava roynt tað aðrastaðni. Tey hava havt tað á matarseðlinum á Hotel Føroyum í nøkur ár og hava fingið nógvar fyrispurningar um Sushi á hinum matstøðunum, sum hoyra til samtakið.

- Men vit fara eisini at selja góðar sadwish's, sum eisini verða at fáa í Borðrókií Norðurlandahúsinum og í Café Vágsbotn, sum eins og Etika, letur upp tann 1. mai.

### Eisini uttandura

Sum sagt verður ein partur av virkseminum hjá Etika 'take away', men tað ber eisini til at sita og njóta mat og vín á staðnum. Og í summar er ætlanin at seta nøkur borð útum eisini, treytað av, at tey fáa uttandura skonkiloyvi.

- Vit rokna við, at hetta er eitt konsept, sum fer at loysa seg. Tað liggur væl fyri mitt á Áarvegnum og vit trúgva upp á, at úrvalið hevur eitt breitt kundagrundarlag. Og so hava vit eisini stórdriftsfyrimunir, tí vit eru partur av einari stórari fyritøku, sigur Winnie Simonsen.

## Fekk fiskakassa í høvdið

Fríggjadagin um middagsleitið fekk politiið fráboðan um eitt arbeiðsóhapp á Vestaru Bryggju í Havn. Ein 17 ára gamal drongur fekk ein kassa í høvdið, tá teir hivaðu tómar fiskakassar umborð á Vestmenning við einum krana. Drongurin fekk skaða í høvdið og varð sendur á sjúkrahúsið. Óvist er, hvussu stóran skaða drongurin fekk.

## Bilur útav, kona innløgd

Fríggjakvøldið koyrdi ein bilur útav vegnum millum Langasand og Nesvík. Fólk komu fram á bilin og boðaðu alarmsentralinum frá. Ein kona í 50unum fekk skaða og varð innløgd á Landssjúkrahúsið við skaða.

## Ljótan fingur móti politinum

Ein ungur maður skikkaði sær so illa móti politinum leygarnáttina, at hann verður skuldsettur eftir politiviðtøkuni og fær eina bót. Millum annað vísti drongurin longutong og bannaði.

## Tvey pør í bardaga

Tveir tilburðir av húsaófriði vóru fráboðaðir í Havn um vikuskiftið. Annar leygarnáttina, har maðurin í húsinum varð tikin inn á støðina at sova rúsin av sær, og hin mánanáttina, har ein kona varð tikin við á støðina at sova rúsin út. Talan var ikki um sama par, men í báðum førum var rúsdrekka trupulleikin.